Gjørdu vart við seg

Tann 12 ára gamla enska gentan Shevaun Pennington, sum rýmdi seinasta leygardag saman við einum fyrrverandi amerikanskum herflotamanni, hevur nú gjørt vart við seg.

Løgreglan í Manchester sigur, at gentan ringdi til foreldrini og segði, at hon hevur tað gott, men hon vildi ikki siga, hvar hon var. Sambært løgregluni ringdi tann 31 ára gamli hermaðurin, Toby Studebaker, eisini til síni næstu, men heldur ikki hann vildi siga, hvar hann var. Bretska løgreglan sigur, at hermaðurin og gentan fóru við flogfari úr London til París leygardagin.

Toby Studebaker var hermaður í Afghanistan, men fór úr herinum seinasta summar, tá hann fekk skaða. Næstringar hansara lýsa hann sum ein sannførdan kristnan mann, men tey siga, at hann hevur ikki verið tann sami, síðani hann misti konuna í fjør. Hon doyði av krabbameini.

Kennedy hartar Bush

Demokratiski senatorurin Edward Kennedy heldur, at George W. Bush, forseti, og stjórnh hansara hava handfarið Irak-kríggið sera illa.

- Amerikanska umsitingin í Irak við Paul Bremer á odda situr í einari borg hjá Saddam Hussein og stýrir landinum, meðan irakar hvørki hava vatn ella streym, sigur Edward Kennedy. Hann mælir stjórnini í Washington til at fáa ST og NATO og fleiri arabisk og muslimsk lond at hjálpa USA at fáa gongd á endurreisingina í Irak. Hann mælir eisini Bush til at bøta um viðurskiftini við Frakland og Týskland og onnur lond, sum vanliga verða mett sum sameind hjá USA, men sum hava tikið eina aðra støðu eftir Irak-kríggið.

Sum so nógvir aðrir amerikanskir politikarar heldur tann 71 ára gamli Edward Kennedy, at grundgevingin, sum USA og Bretland nýttu fyri at fara í kríggj við Irak, var alt ov veik.

Italska stjórnin er rasistisk

Sosialdemokratiski týski politikarin Martin Schulz, sum herfyri fekk italska forsætisráðharran, Silvio Berlusconi, at leypa framav í Evropatinginum, sigur nú, at eftir hansara tykki er italska stjórnin rasistisk.

Í einari sjónvarpssamrøðu fyrradagin segði Martin Schulz, at fólk eiga at minnast til, at Italia hevur eina rasistiska stjórn. Seinni váttaði hann fyri bretsku tíðindastovuni Reuters, at hann hevði sagt hetta, men hann legði dent á, at hann hevur ikki sagt Berlusconi vera rasist. Eygleiðarar ivast kortini ikki í, at hann við hesum hevur borið brenni á bálið.

Dysturin millum Martin Schulz og Silvio Berlusconi í Evropatinginum elvdi til eina diplomatiska kreppu millum Týskland og Italia, tá Berlusconi vildi vera við, at týski tinglimurin hevði verið væl egnaður sum vaktarmaður í einari týningarlegu hjá Nazitýsklandi. Stríðið gjørdi millum annað, at Gerhard Schrøder, kanslari, sleptí ætlanini at halda summarfrí í Italia.

Nunna tømdi kassan

Bretska nunnan Colleen McCabe var vorðin leidd av lívinum í kleystrinum og gjørdi av at royna seg sum yvirlærara í London.

Hon søkti eitt tílíkt arbeiði og fekk tað, men nú vísir tað seg, at hon oyðslaði seks milliónir krónur burtur eftir stuttari tíð. Kanningar hava víst, at fyrrverandi nunnan livdi eitt marglætislív, og pengarnar hevði hon nýtt til mótaklæði, juvelar, dýrt innbúgv, matstovuvitjanir og dýrar ferðir. Samstundis helt hon eitt vakið eyga við, at skúlin ikki nýtti meiri pengar enn neyðugt.

Enn er ikki avgjørt, hvørja revsing fyrrverandi nunnan fær, men dómarin, Christopher Elwen, segði á rættarfundinum, at hon kann rokna við at sleppa at sita nøkur ár í fongsli.

UTTAN ÚR HEIMI

Amerikansku hermenninir missa stríðsviljan

Áhaldandi iraksk álop, ótolandi hiti og óvissan um, nær teir sleppa heimaftur, taka stríðsviljan frá amerikansku hermonnunum í Irak

HERMENN
Árni Joensen



Hesin amerikanski hermaðurin og felagar hansara høvdu fingið at vita, at teir skuldu aftur til USA. Men nú er heimferðin útsett í óasetta tíð. Sama er galdandi fyri túsundtals aðrar hermenn

Mynd: Reuters

Mánadagin fingu fleiri túsund amerikanskir hermenn í 3. herdeildini í Irak at vita, at teir noyðast at verða verandi í Irak fyribils. Ætlanin var, at hermenninir skuldu fara aftur til USA nú, men tað verður av ongum. Tað sama er galdandi fyri túsundtals aðrar hermenn.

Tað eru tey áhaldandi iraksku álopini, sum hava noytt herleiðsluna at útseta heimferðina hjá hermonnunum. Hetta saman við tí ótolandi hitanum, sum er oman fyri 40 stig at kalla hvønn dag, hevur tikið stríðsviljan frá nógvum av hermonnunum.

- Vit hava tríggjar ferðir fingið at vita, at vit skulu heim, men hvørja ferð er heimferðin útsett í óásetta tíð. Okkara deild kom til Flógvan í september í fjør. Nú tíma vit ikki longur, segði ein sersjantur í einari sjónvarpssamrøðu týsdagin. Hann greiddi eisini frá, at hansara deild hevur mist 37 mans í krígnum.

Í einari aðrari sjónvarpssamrøðu fyrradagin søgdu nakrir hermenn, sum ikki vildu nevnast við navni, at teir vilja sleppa heimaftur. Ein teirra segði, at summir hermenn vildu fegnir verið særdir, tí so sleppa teir til USA.

Avgerðin at útseta heimferðina hjá hermonnunum fekk eisini øði í irakar, tí teir vilja hava amerikansku hermenninar av landinum sum skjótast, skrivar Reuters-tíðindastovan.

USA hevur roynt at fáa onnur lond at senda hermenn til Irak, men tað hevur gingið striltið. Kroatia hevur játtað at senda 60 servandar hermenn hagar. Ein áheitan á fronsku stjórnina um at gera tað sama gav einki úrslit, tí franska stjórnin vil ikki senda hermenn til Irak, fyrr enn viðurskiftini eru vorðin tryggari.

Ódn ávirkaði oljuprísin

Ódnin Claudette, sum hevur herjað Texas, ávirkaði alt fyri eitt oljuprísin í USA, og tað merkist eisini í Evropa

OLJUPRÍSUR
Árni Joensen

Tropiska ódnin Claudette, sum týsdagin herjaði amerikanska statin Texas, var tann fyrsta av sínum slagi í ár.

Hóast hon viknaði, tá hon kom inn yvir land, var vandi fyri, at hon fór at oyðileggja oljuleiðingar, og tað ávirkaði alt fyri eitt prísin á oljumarknaðinum. Í New York hækkaði prísurin 35 cent og kom upp í 31,62 dollarar fyri tunnuna.

Príshækkingin í USA fekk eisini ávirkan á marknaðin í Evropa. Á marknaðinum í London hækkaði prísurin á norðsjóvarolju 21 cent upp í 29,17 dollarar fyri tunnuna.

Prísurin hevur annars verið lutfalsliga lágur í seinastuni, tí roknað varð við, at amerikanarar fóru at fylla sínar oljugoymslur. Men trupulleikar við at fáa gongd á framleiðsluna í Irak hava gjørt, at goymslurnar í USA eru munandi minni enn væntað.

Kári endaði uppi á turrum

Ein útróðrardagur hjá Kára Højgaard, løgtingsmanni, herfyri, fekk ein dramatiskan enda, tá ið hann sigldi á land

ÓHAPP
Áki Bertholdsen

Eitt óhapp kemur altíð sum eitt snarljós úr blaum lofti.

Tað kann Kári Højgaard, løgtingsmaður, skriva undir uppá.

Honum dámar væl at rógva út og tá ið hann hevur frí úr tinginum, plagar hann mangan at loysa Høgaleitið, sum er ein 31 fót langur glastrevjabátur og við honum hann fører onkran fongin til lands.

Men ein útóðrardagur herfyri, fekk ikki tann endan, hann hevði hugsað sær, tá ið hann legði frá landi.

Hetta var í dýrdarveðrið leygardagin á Varmakeldu. Kári hevði verið út at rógva bæði hósdagin og fríggjadagin og hann hevði fingið væl, einar 16 sentnarar hvønn dagin.

Hendan leygardagin hevði hann einar fimm sentnarar, tá ið hann dróg og sigldi heim aftur.

– Síðani visti eg onki, fyrrenn tað brast og báturin stóð uppi á turrum, sigur hann.

Hann sigur, at dýrdarveður var og hann hevði júst fingið sær ein drekkamunn og hann væl til passar.

Hann var tríggjar fjórðingar úr landi, tá ið hann setti sjálvstýraran til og setti kósina heimaftur.

Hann ivast ikki í, at hann er durvaður, tí hann vaknaði við kaldan dreym tá ið tað brast og hann stóð á einum tanga beint sunnan fyri Tjørnuvík.

Báturin fekk stóran skaða, men sjálvur slapp Kári snikkaleysur.

Síðani hevur hann arbeitt upp á bátin og nú er hann umvældur.

Kári ásannar, at hann er durvaður og tað hevur hann eisini skrivað í frágreiðingina.

– Tað høvdu verið tríggjar dagar við lítlum svøvni og tað kemur ongin ávaring í slíkum føri, tað einu løtuna ert tú vakin og næstu løtuna ert tú vekk, sigur hann.

Argaður

Sjálvandi var hetta ein keðilig hending hjá løgtingsmanninum, men nú alt spældi væl av, er tað ikki sørt, at hann er argaður við óhappinum.

Tangin, hann sigldi á, hevur longu fingið navnið Posttangin og tey spyrja hann eisini um ikki sjálvstýrarin var frá.

Og nú alt gekk væl kortini, dugir dugur Kári eisini sjálvur at siggja tað stuttliga í tí og hann svarar aftur í sama tónalagi, at hann er eisini onkuntíð sovnaður í tinginum, men tað hevur ikki havt so ógvusligar avleiðingar. Og tað kann so gera tað sama, sigur hann: Sjálvstýrarin stóð til!

Hesar síðstu 14 dagarnar hevur Kári Højgaard umvælt bátin hjá sær, eftir at hann sigldi á land á Varmakeldu og fekk stóran skaða

Mynd: Jens Kr. Vang